GER KVETTIÐ!
Vit rudda goymsluna
damor

Beko Integrerað frystiskáp
- Superlágorka (A)
- Tekur 96 litrar
- 3 skuffur
Fyrr kr. 3.198
Spar kr. 1.200,-
Nú einans 1.998,-

Beko Vaskimaskina
- Superlágorka (A)
- Vaskievni A
- Tekur 5,5 kg
Fyrr kr. 5.598,-
Spar kr. 2.600,-
Nú einans 2.998,-

Beko uppvaskimaskina
- Superlágorka (A)
- Vaskievni A
- Turkievni A
- Skiggi í vísur resttíð
Fyrr kr. 5.598,-
Spar kr. 2.600,-
Nú einans 2.998,-

Indesit turkitrumla
- Kondens
- Tekur 7 kg
- Tíðarstýrd
- Reverserandi trumla
Fyrr kr. 5.498,-
Spar kr. 1.700,-
Nú einans 3.798,-

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor



*Tey fáa sær frí eina løtu, nú myndamaðurin er komin á vitjan. Nógv er gjørt, men enn er nakað eftir at gera til leygardagin – vm. Jóngerð Petersen, Høgni Johannesen, Súsanna Hvidbro og Jóna Joensen*

# Tey eru spent til jólasøluna

**Komandi leygardag verður árliga jólasølan hjá varda verkstaðnum á Brekku í Klaksvík. Nú røður um at skunda sær og gera lutirnar lidnar, og tað royna Jóngerð, Høgni og Jóna av øllum alvi**

**HANDVERK**
*Orð/myndir: Snorri Brend*

**Klaksvík:** - Ja, tú kanst ætla at vit eru spent til leygardagin. Og vit vóna eisini, at tað fara at koma nógv fólk.

Í ovaru hæddini á varda verkstaðnum á Brekku í Klaksvík sita trý fólk og kýta seg. Øll hava okkurt handaligt at takast við.

Jóngerð, Høgni og Jóna sita við hvør sítt borð. Tey hava líka tíð at hyggja upp, tá blaðmaðurin kemur framvið.

- Hygg, er tað ikki vakurt!, sigur Høgni, og vísir fram nakað av tí, sum hann persónliga hevur gjørt.

Jólasølan verður opin leygardagin frá kl. 10 til 16.

## Hoyrivernd

Í hølunum á varda verkstaðnum eru fleiri fólk knýtt at arbeiðinum, - menn og kvinnur.

Í niðaru hæddini eru fleiri mans til arbeiðis: Tveir sita og pussa nøkur hjørtu, sum eisini skulu á søluborðið leygardagin, meðan aðrir eru í holt við onnur ting.

Tveir teirra gera slíkt arbeiði, har neyðugt er at hava hoyrivernd: Annars ger plattar til føroyska útflutningin, og hin ger bustir, sum skulu gera sítt til at sópingarbilurin kann halda Klaksvíkar bý bæði reinan og fríðan.

Tað er mánadagur, klokkan er farin at eitt og nú styttist: Nú má alt fáast frá hondini, tí leygardagin verður tann stóri dagurin hjá teimum.

Ein dagur, tey síggja fram til á hvørjum ári, tá árliga jólasølan fer av bakkastokki

Nú eru bert fimm dagar eftir. Tey hava longu gjørt nógvar lutir, men nú skulu teir seinastu gerast lidnir.

Í framleiðsluni er dentur lagdur á at framleiða vørur sum á ein ella annan hátt er forkunnug ella sermerkt.

Eitt nú eru jóladekoratiónirnar gjørdar úr rekaviði, tara og sjógrasi. Eisini eru dekoratiónir, sum eru gjørdar úr hornum. Hartil er eitt nýtt slag av jólanissum, sum eru ætlaðar sum kunnu standa uttanfyri húsini við eini lykt við livandi ljósi í.

Av øðrum, sum fæst til keyps, kunnu nevnast pakkakalendarar, dúkar undir jólatræið, jólapappírsklipp og jóladúkar. Og so eru tey væl umtóktu skeribrettini til skerpikjøt sjálvandi eisini at fáa.



*Jóngerð Petersen er ófør til tað handaliga arbeiðið. Hon gleðir seg eisini til leygardagin*